## Leingja sáttmálar í EB/S

Miðvallarleikarin Brian Olsen áleyparin frá Norðskála Leif Niclasen, hava báðir longt sáttmála sín EB/Streym. Tað boðar felagsliðið frá á heimasíðu sínari í dag. Talan er í báðum førum um tveyára sáttmálar, sum vórðu undirskrivaðir í farnu viku. Báðir hava teir verið partur av Formulahópinum seinastu árini, og hava teir fingið alsamat meiri spælitíð. Heimasíðan hjá EB/Streymi skrivar, at tey í felagnum fegnast um, at leikararnir, sum eru uppvaksnir í felagnum, framvegis ynskja at stuðla EB/Streymi.



## Tjaldur í Sunset-deildini

Við 37-25 sigri á Neistanum í gjár hava Tjaldurskvinnur spælt seg upp í Sunset-deildina. Sum vera man fegnast tey í Tjaldri um, at tey nú aftur eru í fremstu røð. Tjaldur styrkti munandi um hópin undan hesum kappingarárinum, og í vetur hava tríggjar útlendskar kvinnur styrkt um liðið. Umframt uppflyting var málið eisini at gera tað gott í steypakappingini, og tann parturin eydnaðist eisini, tá liðið bert var eitt mál frá at tryggja sær finaluplássið. Til komandi ár verður meddað enn betri. Úrtøkan í steypakappingini skal betrast, og í landskappingini vil felagið verða millum tey trý fremstu. Enn er ikki endaliga greitt, hvat felag noyðist eina deild niður at spæla. Men alt bendi á, at hetta verður VÍF.

# Nú skal tað verða

**ÍF er í finaluni í kvinnuflogbólti, fyri fjórðu ferð, og seinastu árini hava fuglfjarðakvinnur verið fastir gestir á føroyska flogbóltstindinum, bæði í landskapping og í steypakapping**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Eins og við Karin Mikkelsen hjá SÍ, høvdu vit Helen á Lakjuni gjøgnum telefonina, har vit fregnaðust um vónirnar til finaludagin, hvussu kappingarárið hevur hilnast, umframt týdningin av at hava eitt lið í einari steypafinalu.

### Vegurin til finaluna

Hjá kvinnunum kom ÍF í finaluna, tí tær vóru á odda eftir fyrsta leikumfarið. Tær vunnu allar sínar dystir. SÍ var nær við, men tað bilti ikki so nógv, tí SÍ vann báðar steypafinalurnar, og tí eru tær her í dag. Hesi bæði liðini dystast um gullið í landskappingini eisini, so hetta eru røttu finaluliðini, og tey kunnu best av øllum geva okkum ógloymandi finalu. Sørvingar eiga hesar finalurnar, kunnu vit siga. Fyri fyrstu ferð í søgu felagsins hava bæði liðini spælt seg í finaluna, men tað er als ikki so undrunarsamt, tí flogbólturin í Sørvági stendur seg serlig væl. Í landskappingini standa hesi bæði liðini seg eisini væl.

### Fyrstu finalan

Helen á Lakjuni er ein royndur flogbóltsleikari, og við sínum 42 landsdystum, (júst dupult so nógv sum Karin Mikkelsen hjá SÍ blaðm.) er hon ein av royndastu leikarunum í finaluni. ÍF hevur eisini aðrar royndar leikarar á liðnum, og millum annað er onkur leikari farin um tey 40 árini, meðan fleiri eru yvir 30-ára aldur. So rutinan er í lagi á ÍF liðnum. Sigast kann at elsti leikarin á SÍ liðnum er bert 23-ára gomul. Yngstu leikararnar í finaluni eru bert 14 og 15 ára gomlu genturnar, Urd Traðará og Gunnleyg Joensen, úr ávíkavist ÍF og SÍ. Báðar hava tær fingið sítt gjøgnumbrot í inniverandi kappingarári, og Helen sigur seg ikki ivast í at Urd Traðará fer at vera ein fongur hjá felagnum. Annars sær hon bjart uppá framtíðina.

- ÍF hevur ikki havt so gott ungdómsarbeiði fyrr, men nú hava vit eitt stórsligið ungdómsarbeiði, og tað verður óivað skjótt, at man fer at síggja ágóðan av tí, sigur Helen, ið gleðist yvir at hava Urd á liðnum

### Mátin at vinna

Helen á Lakjuni metir, at um tær skulu vinna móti SÍ, so skulu tær fáa sítt spæla at flóta, og annars at trúgva uppá sigurin.

- Vit mugu leggja press á við servunum, og blokka serliga Karina Mikkelsen, umframt miðjuna hjá teimum. Tað er teirra sterkastu vápn, og tey skulu og mugu vit neutralisera, sigur Helen á Lakjuni, ið hóast mangar finalur við landsliðnum, enn hevur sína fyrstu til góðar við barndómsfelagnum ÍF, men tað verður so um vikuskiftið, og verður tað hervið ynskt teimum góða eydnu.



*Helen á Lakjuni er tann leikarin á ÍF liðnum, ið hevur spælt flest landsdystir, og hóast hon mangan hevur spælt finalu við landsliðnum, hevur hon ikki roynt at spælt finalu fyri ÍF enn. Hetta høvið fær hon um vikuskiftið, tá hon ætlar sær at vinna móti SÍ*

### Úrslitini av finalunum higartil:

| | |
|---|---|
| 2000 Dráttur-Mjølnir | 0-2 |
| (Serlig stigaskipan varð nýtt hetta fyrsta árið) | |
| 2001 Mjølnir-Dráttur | 3-2 |
| 2002 TB-Mjølnir | 3-1 |
| 2003 TB-ÍF | 3-1 |
| 2004 TB-Dráttur | 3-1 |
| 2005 Mjølnir-TB | 3-1 |
| 2006 TB-ÍF | 3-1 |
| 2007 Dráttur-KÍF | 3-2 |

### Hóparnir í kvinnufinaluni:

**ÍF**

| Nr. | Navn | Aldur | Hædd | Leikpláss | Landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 0 | Rønn Eliasen | 37 | 168 | Libero | 0 Føroyar |
| 1 | Sóley Troleis | 29 | 181 | Diagonalur | 5 Føroyar |
| 2 | Urd Traðará | 14 | 176 | Miðja/diag. | 0 Føroyar |
| 3 | Heidi Dam | 22 | 168 | Kant | 3 Føroyar |
| 4 | Katrin Olsen | 40 | 167 | Hevari | 5 Føroyar |
| 6 | Helen á Lakjuni | 30 | 177 | Miðja | 42 Føroyar |
| 7 | Anna Maria M. Kruse | 27 | 178 | Kant | 5 Føroyar |
| 8 | Annika Rasmussen | 31 | 172 | Miðja | 0 Føroyar |
| 9 | Guðrun Lerwig | 17 | 170 | Diagonalur | 0 Føroyar |
| 10 | Barbara á Líðarenda | 17 | 167 | Hevari/diag. | 0 Føroyar |
| 11 | Herbjørg Jøkladal | 21 | 173 | Miðja | 0 Føroyar |
| 12 | Maja Filipovic | 26 | 175 | Hev./kant/dia. | 5 Bosnia/Hers |

**SÍ**

| Nr. | Navn | Aldur | Hædd | Leikpláss | Landsdystir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Karin Mikkelsen | 22167 | Kant | 21 Føroyar | |
| 2 | Birgit Guttesen | 17 | 178 | Miðja | 5 Føroyar |
| 3 | Unn P. Kruse | 19 | 171 | Miðja | 0 Føroyar |
| 4 | Elin Weihe | 17 | 168 | Hevari | 0 Føroyar |
| 5 | Helga Guttesen | 19 | 181 | Diagonal | 0 Føroyar |
| 6 | Vivian Joensen | 17 | 172 | Kant | 0 Føroyar |
| 7 | Tórfríð Tavsen | 23 | 164 | Libero | 0 Føroyar |
| 8 | Annbritt Thomasen | 22 | 162 | Diagonal | 0 Føroyar |
| 9 | Annika Niclasen | 22 | 172 | Kant | 0 Føroyar |
| 10 | Heidi Christiansen | 16 | 170 | Miðja | 0 Føroyar |
| 11 | Annika á Stongum | 19 | 163 | Hevari | 13 Føroyar |
| 12 | Gunnleyg Joensen | 15 | 169 | Kant | 0 Føroyar |